# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Plettskot frá Citroën




*Citroën C5 er ein nútímans bilur við flottum designi*



*C5 stationcar. Citroën hava valt ein heilt nýggjan designstíl*



*Citroën C5 innan. Kabinan er gjøgnumførd og ergonomiskt rætt designað*

## Citroën C5 Tourer 138

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litra HDi (diesel) við 138 hk |
| Snúningsmoment: | 320 Nm við 2.000 snún/min |
| CO2 útlát: | 160 g/km |
| 0-100 km/t: | 10,9 sek |
| **Støðd og vekt:** | |
| Longd: | 482,9 cm (Tourer) |
| Breidd: | 186,0 cm |
| Hædd: | 147,9 cm |
| Eginvekt: | 1780 kg |
| Viðførisrúm: | 505 litrar (Tourer) |
| Prísur : | kr. 346.000 |
| Søluumboð: | Ivan Johanen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

**Við nýggja C5 hava Citroën góð kort á hondum í kappingini við stóru miðalklassa bilarnar. Sum nakað heilt nýtt kann C5 kundin nú velja ímillum hydrauliska fjaðraskipan ella vanligan undirvogn við stálfjaðrum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggi Citroën C5 er ein stórur miðalklassa bilur, sum sær út sum ein týskur bilur bæði uttan og innan, men við tí eyðkenda kom-fortinum sum fransmenn eru kendir fyri. Hesin nýggi C5 er bæði størri og rúmligari enn forgangarin við sama navni.

C5 er ein bilur við koyri-eginleikum og komforti á høgum støði. Bilurin fæst við tveimum ymiskum fjaðraskipanum, Hydractive 3-Plus, sum er ein hydraulisk skipan, og við vanligum undirvogni við stálfjaðrum. Báðar útgávurnar hava multilink hjólupphang framman og aftan, av sama slagi sum tann størri Citroën C6.

C5 hevur allar trygdarskipanir innbygdar sum standard sum t.d. sjey airbag.

Kabinan er gjøgnumførd, ergonomiskt rætt designað og kvaliteturin merkist allan vegin ígjøgnum. Miðan í rattinum (rattnavið) er fast, eins og á Citroën C4, og flytur seg ikki tá rattið verður snarað til høgru og vinstru - smart og lætt at handfara.

Sjey motorar eru at velja ímillum, tríggir bensin og fýra diesel. Bensinmotorarnir eru hesir: 1,8i við 127 hk, 2,0i við 143 hk og 3,0i V6 við 215 hk. Dieselmotorarnir eru hesir: 1,6 við 110 hk, 2,0 HDi við 138 hk, 2,2 HDi við 173 hk og 2,7 V6 við 208 hk.

Bilurin, sum vit royndarkoyrdu, var ein C5 Tourer (stationcar) við 2,0 litra HDi dieselmotori við 138 hk og hydrauliskari fjaðraskipan. Við einum snúningsmomenti upp á 320 Nm við 2.000 snún/min hevur motorurin stórt yvirskot av kraft og hoyrist nærum ikki undir koyring. Tað merkist, at stórur dentur er lagdur á ljóðdoyving.

Citroën C5 fæst sum sedan og stationcar. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin. Prísirnir byrja við 280.000 krónur.




*Sedan útgávan av Citroën C5*